## Exxon er aftur størst

Á nýggjasta listanum hjá Fortune yvir tær 500 størstu fyritøkurnar í USA, er Exxon Mobil aftur at finna á fyrstaplássinum. Í fjør settist handilsketan Wal-Mart annars á fyrstaplássið, men nú er Exxon altso aftur størst. Á listanum, har verða fyritøkurnar vigaðar eftir umsetningi, er Wal-Mart nummar tvey, meðan Chevron, ConocoPhilips og General Electric eru á næstu plássunum. Eisini er ein listi við fyritøkunum, sum hava størsta hallið, og her var AIG ovast við einum halli upp á góðar $100.000.000.000!

## Menn handilslívið

Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning er vorðin partur av altjóða granskingarætlan, sum hevur til endamál at menna handil í útjaðaranum. Londini sum luttaka í verkætlanini eru umframt Føroyar, - Ísland, Grønland, Norra, Svøríki, Finnland, Skotland og Írland. Talan er um trý ára verkætlan, ið hevur sum endamál, at menna eitt uppskot til handil í smáu samfeløgunum í útjaðaranum. Handilin skal hava gott úrval av vørum og veita eina fjølbroytta tænastu. Eydnast henda verkætlan til fulnar, verður úrslitið øktur búskaparligur vøkstur í útjaðaranum umframt betri trivnaður. Tað er Olga Biskopstø, samfelagsfrøðingur á Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning, sum hevur ábyrgdina av føroyska partinum av verkætlanini.

# Fara undir illa umstríddan veg í Leirvík í summar

**Vegurin í gjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin, verður boðin út í næsta mánaða, sigur Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum**



*Gongst sum ætlað, ferður klárt at fara undir eina ta mest umstríddu vegagerðina í landinum í summar. Talan er sjálvandi um vegaføringina ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin*

VEGUR ÍGJØGNUM LEIRVÍK

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú verður langt um leingi farið arbeiðið at gera nógv umrødda vegin ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin

Tað staðfesti Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum í Løgtinginum mikudagin, tá ið Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður fregnaðist eftir, hvussu gongur við ætlanini at gera vegin.

Annika Olsen sigur, at projekteringin hevur verið liðugt leingi, men síðani eru ymsar tillagingar gjørdar fyri at lúka nýggjastu krøvini til slíkar vegir.

Endaliga projektið verður liðugt um tvær vikur og í næsta mánaði verður arbeiðið boðið út.

Gongur alt eftir ætlan, kann sostatt farast undir sjálvt arbeiðið mitt í summar um mánaðarskiftið juni-juli.

Løgtingið hevur samtykt at seta 40 milliónir av til endamálið, men ført hevur verið fram, at møguliga fer prísurin upp á 50-55 milliónir.

Men Annika Olsen sigur, at nú er kostnaðarstøðið fallið nakað aftur, so tað er ikki vist, at meirkostnaðurin verður so stórur, sum áður mett.

Hon sigur, at tað verður ikki fyrrenn tilboðini eru komin inn, at full greiða fæst á, hvat vegurin fer at kosta og so má støða takast til tað, tvs, um tillagingar skulu gerast í projektinum og hvussu nógv skal játtast til endamálið.

Tórbjørn Jacobsen helt, at tað verður neyðugt hjá Løgtinginum at játta neyðuga peningin og tað væntar hann ikki fer at verða tórført.

Eftir nógv togarí aftur og fram, endaði tað við, at nýggi vegurin skal gerast niðri í bygdina í Leirvík.

# Vil kanna møguleikan at avtaka rentustuðulin til sethúsaeigarar

**Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag tekur undir við at samgongan kannar møguleikan fyri at niðurlagað rentustuðulin so líðandi, men tað má sjálvandi ansast eftir, at teppið ikki verður rykt undan nøkrum**

RENTUSTUÐUL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg haldi, at tað er rætt at samgongan fer undir at kanna møguleikan fyri at niðurlagað rentustuðulin til sethúsaeigarar.

Tað sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

Í sambandi við kreppuna, hevur nógv verið tosað um møguleikan fyri at útvega landskassanum eyka inntøkur.

Men í hesum sambandi vil forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag ikki hoyra talan um at hækka avgjøld og skattir.

Hinvegin hevði hon góðtikið, at samgongan fór undir at kanna møguleikan fyri at lækka ella heilt at avtaka rentustuðulin til sethúsaeigarar.

Men hon ásannar, at hetta er ikki eitt tiltak, sum kann setast í verk beint nú. Hetta er eitt tiltak, sum má setast í verk so líðandi yvir eitt longri áramál og tí fer tað heldur ikki at geva landskassanum fleiri inntøkur við tað fyrsta.

Ingeborg Vinther er ikki ósamd í tí sjónarmiði, at rentustuðulin fyrst og fremst er ein stuðul til bankarnar og tað einasta, hann elvir til, er at húsini verða dýrari, enn tey annars høvdu verið, var ongin rentustuðul.

Og hon dugir ikki at síggja nakað endamál í, at landskassin skal rinda bankunum ein almennan stuðul upp á yvir 100 milliónir, ella, hvussu stórur hann nú er.

Kortini staðfestir hon, at skal rentustuðulin takast av, má tað vera við størsta varsemi, so at teppið ikki verður skrykt undan teimum sethúsaeigarunum, sum sita tungt.



*Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, er ikki ósamd við tí sjónarmiðið, at rentustuðulin til sethúsaeigarar í veruleikanum bara er ein stuðul til bankarnar, men skal hann avtakast, skal gerast við størsta varsemi*



*Bileigarar kunnu ikki fara til TAKS við rokningini, fyrrenn teir hava prógvað, at tað er ómøguligt, ella í minsta lagi sera tórført at fáa pengarnar aftur frá bilasøluni*

# Skulu krevja peningin aftur frá bilasølunum

**Kærunevndin í skattamálum heldur framvegis, at tað var ólógligt at krevja mvg av nýggjum bilum, sum vórðu seldir frá 1999 til 2005. Men pengarnir skulu krevjast aftur frá bilasøluni og ikki frá TAKS**

MVG

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nakað síðani tók illgruni seg upp um, at fleiri túsund bileigarar hava betalt ov nógv í mvg, tá ið teir keyptu bil.

Teir, sum keyptu bil í tíðarskeiðnum frá 1. mai í 1999 til 28. apríl í 2005, hava nevniliga eisini goldið mvg av skrásetingargjaldinum.

Tað sigur kærumyndugleikin í skattamálum, er ólógligt.

Men endalig avgerð er ikki tikin, tí nú verður málið roynt í rættinum.

Kortini hevur ein ørgrynna av bileigarum, sum keypti bil í hesum tíðarskeiðnum, kravt mvg aftur, sum teir halda seg hava goldið ov nógv.

Spurningurin er bara: Hvagar skal rokningin sendast?

Onkrir bileigarar hava sent rokningina beinleiðis til TAKS.

Men kærunevndin sigur, at tað skulu teir ikki gera, tí rokningin skal sendast beinleiðis til bilasøluna.

Ein bileigari hevur kært Taks, tí TAKS vil ikki betala mvg aftur.

Og í eini nýggjari avgerð, gevur kærunevndin TAKS viðhald.

Kærunevndin heldur framvegis, at tað var ólógligt at krevja mvg av skrásetingargjaldinum, men bileigarar skulu senda rokningina til bilasøluna, tí tað er bilasølan, sum hevur kravt gjaldið inn.

Aftan á kann so bilasølan avrokna víðari við TAKS.

Ikki fyrrenn tað kann prógvast, at tað ikki ber til at fáa peningin afturgoldnan frá bilasøluni, kann tað koma upp á tal at senda rokningina til TAK, sigur kærunevndin.